FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
Føroya Gjaldstova
Tórshavnar 39, Postsmoga 2009, FO-165 Argir, Føroyar

Starv á Føroya Gjaldstovu sum

kervisfyrisitari

er leyst at søkja til setanar beinanvegin:

Í 1997 tók Føroya Gjaldstova nýggja fíggjarstýringarskipan í nýtslu. Skipanin er bygd á Oracle dátugrunnin og verður rikin á einari HP9000 maskinu við HP-UX stýrisskipanini.

Gjaldstovan er í fer við at menna eina nýggja lønarskipan í sama umhvørvi, og er ætlanin, at skipanin verður tikin í nýtslu fyrst í ár 2001. Í hesum sambandi verður søkt eftir dugnaligum fólki til kervisfyrisitanina at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

Ábyrgdarøki:
Viðkomandi,ið settur verður, hevur sum arbeiðsøki at fyrisita EDV-kervið og at verða við at innføra nýggju lønarskipanina.

Av uppgávum kunnu nevnast:
Vera við í innføringini av nýggju lønarskipanini, t.e. nároyna skipanina, uppseta skipanina, leggja inn stamdáta, gera listar (úrrit).
At fyrisita dagliga raksturin av EDV-skipanini, t.e. stýra brúkara atgongdum, leggja inn og viðlíkahalda koyringar, viðlíkahalda uppsetanina av skipanini, viðlíkahalda og gera nýggj úrrit, inn- og útlesingar av fílum
At kenna skipanina á superbrúkarastøði.
At gera og seta í verk vegleiðingar.
At fyrireika mannagongdir og broyta uppsetan av skipanini so hon til eina og hvørja tíð stuðlar upp undir galdandi mannagongdir. Er ein partur av eini størri heild og skal eisini taka sær av øðrum uppgávum.

Útbúgving og krøv til viðkomandi, ið verður sett/-ur:
Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til edv og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggjar uppgávur. Tað er ein fyrimunur, um tú kennir til Oracle og brúkaraamboð knýtt til Oracle, so sum Oracle Data Query og Oracle Report Writer.

Setanarviðurskifti:
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknarfreist:
Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu vera Føroya Gjaldstovu í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. januar 2000. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard, edv-leiðara.

Á gjaldstovuni starvast umleið 30 starvsfólk. Gjaldstovan fører roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og fører m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. EDV-deildin á Gjaldstovuni hevur sum høvuðsuppgávu, at reka, menna og viðlíkahalda landsins roknskaparskipan, eina felags lønarskipan fyri almennu stovnarnar og eitt landsumfarandi nærnet/intranet fyri stovnarnar undir fíggjarmálastýrinum.

Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til idnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 171
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:

Skrásetingar-nr. P/F 41,
P/F H. N. Jacobsens Bókhandil, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Karl Heine Niclasen, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Ólavur Arge, Oman Hoydalar 5, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 12. januar 2000

Kristin Balle

Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

Eind 1:	**Heilsufrøðilig viðurskifti**	**31. jan., 1. og 2. febr. 2000**
Eind 2:	**HACCP**	**14., 15. og 16. febr. 2000**
Eind 3:	**Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum**	**28. og 29. febr. og 1. mars 2000**

Málbólkur: Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk,ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

Undirvísarar: Serfrøðingar í innaneftirliti.

Stað: Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00-17.00.

Skeiðkostnaður: Kr. 3.000 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum)

Prótvøka: Skipað verður fyri prótvøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið.

Frálæran fevnir m.a. um:
Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.
Freistin at boða frá luttøku er **19. januar 2000.** Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 424573, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo. Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmelding er bindandi.** Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 424573 - Fax 424428

Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti
Eind 1: ____ Set kross **Eind 2:** ____ Set kross **Eind 3:** ____ Set kross

Eftirnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Starv/arbeiðsplass:
Gøta:	Tlf. arbeiði:
Postnr./stað:	Tlf. heima:
Teldupostur:	Gjaldari:

GRAV-STEINAR

Sera bíligir gravsteinar kunnu fáast við at venda sær til:
Tlf. 371345
ella **371687**

Skorsteins-sóparin
er við til at halda umhvørvið reint
Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar
Andrass á Krossbrekku
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

Halt **sosialin**

Umlættingarfamilja

Barnaverndarnevndin í Tórshavnar kommunu søkir eftir familju í høvuðsstaðarøkinum at taka tvær gentur 7 og 10 ára gamlar til umlætting í vikuskiftum og eftir tørvi.

Umráðandi er, at familjan,ið sett verður, er vælvirkandi og kann samstarva við foreldur og barnavernd.

Nærri fæst at vita, við at ringja á sosialu deild Tórshavnar býráðs tlf. 31 51 60 og tosa við Onnu-Kari Thomsen ella Selmu Ellingsgaard.

Umsóknirnar skulu stílast til: Tórshavnar kommuna, Barnaverndin, postrúm 32, 110 Tórshavn.

Tórshavnar kommuna

Dagstovnurin á Oyri

Til dagliga reingerðing av Dagstovninum á Oyri verður hervið søkt eftir einum fólki at byrja beinanvegin.

Skrivlig umsókn skal verða Sunda Kommunu í hendi seinast 17. jan. 2000.

Sunda Kommuna
460 Norðskála
Tlf. 422113

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

J|A|S|P|I KETLAR
Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



Bæði dupultir og einkultir
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Broyting í upplatingartíðunum á posthúsunum í SMS og í miðbýnum í Tórshavn

Frá mánadegnum 17. januar 2000 verða upplatingartíðirnar á posthúsunum í SMS og í miðbýnum hesar:

Mánadag til mikudag 10.00 til 16.00
hósdag og fríggjadag 10.00 til 17.00

Postverk Føroya

Lýsið í **sosialinum**

Almanna- og heilsumálastýrið

Starv

Á Rokniskapardeildini í Almanna- og heilsumálastýrinum er eitt hálvtíðarstarv leyst til setan sum skjótast.

Uppgávurnar fevna m.a. um:

- dagføra lønir sambært sáttmálar,
- avgreiða lønarskjøl til lønarkervið,
- avgreiða lønarávísingar og lønarkoyringar,
- umsita lønarrættingar og avstemma,
- málsviðgerð í samband við lønaravgreiðslu.

Persónlig krøv til umsøkjaran:
Tann, ið settur verður, skal vera álítandi, røkin og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Krøv til útbúgving og royndir:
Umsøkjarar skulu havva skrivstovuútbúgving og/ella hóskandi ástøðiliga útbúgving, umframt hava royndir í brúki av EDV. Umsøkjarar, ið hava arbeitt við lønum ella hava gott innlit í lønarviðurskifti, hava fyrimun.

Lønar- og setanartreytir:
Arbeiðstíðin verður í miðal 21 tímar um vikuna. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, leiðara fyri Rokniskaparhaldið tlf. 354043 lokal 394.

Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 28. januar 2000, kl. 14.00.

Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17^{00} til 23^{00}

212380

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Vegna farloyvi verður søkt eftir:

Einum sjúkrahjálpara ella sosial- & sunnheitsassistenti við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum frá 1. februar 2000 til 31. august 2000.

Einum sjúkrahjálpara ella sosial- & sunnheitsassistenti við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum frá 1. februar 2000 til 31. januar 2001.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Sjúkrahjálparafelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum kunnu fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371666 lokal 147.

Umsóknir við avriti av prógvum verða at senda til:

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
Fyristøðukvinnan
Postboks 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 27. januar 2000.

Pedagogur

Í tíðarskeiðnum frá 1.2. til 31.12.2000 er eitt starv, 30 tímar um vikuna sum pedagogur leyst at søkja, fyri sáttmálasettar pedagogar í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Um ongin pedagogur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett.

Á bústovninum, sum er fyri autistar, búgva tveir dreingir og tveir aðrir koma til umlætting.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og F. Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Jóhonnu Hansen millum kl. 9-14 gerandisdagar.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða bústovninum í hendi í seinasta lagi 27.1.

Bústovnurin við Garðavegin
700 Klaksvík • tlf. 45 63 10

1899 1999 **Miele**
H sarhaldst l 100 r
Altí› betri
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi - FO 110 Tórshavn - Tel. 314949 - Fax 311330 - E-mail: hthdul@post.olivant.fo